## Milan ætlar sær Crouch

AC Milan hevur farnu vikurnar roynt at fingið avtalu í lag við framherjan hjá Wolfsburg, Edin Dzeko. Tað hevur ikki verið møguligt, og nú ætlar felagið sær Peter Crouch úr Portsmouth. 28 ára gamli onglendingurin fer at hjálpa væl í luftspælinum, metur leiðslan í felagnum, og tí er ætlanin er geva arbeiðsgevaranum hjá Crouch eitt tilboð. Peter Crouch hevur áður millum annað umboðað Tottenham, IFK Hasselholm, QPR, Aston Villa, Southampton, Liverpool og Portsmouth.



## Skulu halda nullið

Erik Hamrén og Rosenborg høvdu sína fyrstu venjing á ferðini í Føroyum í gjár. Og á ovari vølli í Gundadali var venjarin væl nøgdur. – Tað royndist okkum væl á graslíkinum. Tað verður ikki ein orsøk, um tað ikki gongur væl. Í verjupartinum skulu vit verða ansnir og tættir, og fólk, eg havi tosað við, meta, at vit vinna við fimm ella seks málum. Tað hugsa vit ikki um, tí vit hava altíð virðing fyri mótstøðuliðnum. Tað er ongantíð ein lættur dystur í Evropa, sigur Erik Hamrén, venjari hjá Rosenborg, við RBK.no.

# Svimja í

**Hóast ein dagur er eftir at svimja, hava føroysku svimjararnir longu svomið seg til sama tal av gullmerkjum, sum tey gjørdu á Rhodos fyri tveimum árum síðani**



jakup@sosialurin.fo

Jákup Mørk

Elspa Mørkøre átti sín stóra part, tá føroyska svimjilandsliðið fyri tveimum árum síðani gjørdi eitt methál.

Elspa sjálv hevur tó flaggað út, og er tí ikki longur partur av føroyska landsliðnum, men hetta tykist ikki nerva føroysku úrtøkuna á Álandi.

Aftur mikudagin togaðu førosyku svimjararnir fimm gullmerki heim, og hóast vit nú kunnu iðra okkum um tvær kolldømdar stafettir, so er lítil ivi um, at nýtt met verður sett seinnapartin í dag, tá vit heilt víst eru partur av fleiri finalum.

### Mona tók alt á bóli

Mona Simonsen svam ein framúr góðan 400 metur í frísvimjing. Mona var annars tilmeldað við triðju bestu tíðini, men í finaluni gjørdi hon bart, og svam seg til gull og nýtt oyggjaleikamet.

Bjørg Seloy vann óvæntað bronsu i 200 rygg, og Kári J. á Høvdanum nærum líka so óvæntað bronsu í 50 firvald. Og hóast Malan var væntað at gera seg galdandi í 100 bringu, so var tíðin og føroyska metið 1:13.13 framúr, tá ið hugsað verður um, at hon dregist við ein skaða í økslini.

Hinvegin kiksaði tað akkurát hjá Kára og Guðruna av vinna heiðursmerki í ávíkavist 200 rygg og 50 firvald, hóast tey vóru styrkismett at verða rættiliga tryggir heiðursmerkjakandidatar.

Pál var bara 12 hundraðpartar frá gullinum í 100 blandað, og 4x100 blandað liðsvimjingin hjá monnum var eisini bara 33 hundraðpartar frá gullinum har, eftir at hava svomið eini 5 sekund undir mettíðina frá Oyggjaleikum á Álandi, og eini 11 sekund undir landsliðsmetið.



**Úrtøkan hjá svimjilandsliðnum á Álandi hevur í meðal verið fimm gullmerki um dagin**
Mynd: Álvur Haraldsen

## Mistu aftur eina stafett

Aftur mikudagin misti føroyska svimjiliðið eitt heiðursmerki.

Hesa ferð var tað stafettin hjá kvinnum, sum varð kolldømd, tí ein tjóvstartur hevði verið á vegnum.

Føroyska liðið kom annars á mál á einum tryggum oddasessi, men fagnaðurin var skjótt av, tá tað frættist, at dómararnir gjørdu vart við tjóvstartin, sum hevði verið. Ístaðin fór gullið á teininum til Jersey.

Soleiðis hava Føroyar mist tvær stafettir, harav onnur heilt víst svam seg til gullið. So hóast fagnaðurin er stórur í føroysku leguni, so er einki at ivast í, at svimjararnir eisini iðra seg um tað, sum kundi verið.

## Poula setti met

Poula Ø. Mohr setti nýtt juniormet í 100 frí, tá ið hon sum fyrsti svimjari í 4x100 frí svam teinin uppá 59.38 sekund. Poula átti sjálv juniormetið á 1:00.15, og gjørdist harvið fyrsta føroyska juniorgenta undir minuttin á 100 metra teininum, hóast hon ikki hevur veruligan junioraldur fyrr enn í 2010.